# Fiskiroyndir í góðum tíðum

**Neyð lærir nakna kvinnu at spinna, er gamalt orðatak. - Kanska skulu vit hava ringar tíðir í fiskivinnuni, áðrenn nøkur alternativ veiða av týdningi verður roynd aftur, sigur Manbjørn Solmunde, sum saman við Vibergi Sørensen var tann fyrsti at fiska havtasku við gørnum undir Føroyum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



Hvør veiða hevur sína søgu. Summar eru langar, aðrar stuttar. Sumt eydnast, annað miseydnast. Rækjuveiðan hevur sína søgu, og svartkjaftaveiðan sína. Soleiðis er tað nú einaferð í fiskivinnuni.

Ein av teimum nýggjaru søgunum, er søgan um garnaveiðina eftir havtasku og svartkalva.

Upprunin til havtaskuveiðina við gørnum, var ein spanskur garnabátur og veiðitjóvur, sum ólógliga setti gørn á føroyskum sjóøki.

Hetta gav føroyskum fiskimonnum nakað at hugsa um, og stutt eftir fóru føroysk skip at veiða havtasku og svartkalva við gørnum.

Hetta var í ringastu kreppuárum í føroyskari fiskivinnusøgu.

### Trúðu uppá garnaveiðina

- Tá ið vit byrjaðu at fiska havtasku við gørnum fyri 10 árum síðan, vóru vánaligar tíðir í Føroyum. Vit fingu ongan stuðul til hesar royndir, men trúðu uppá, at hetta var ein møguleiki. Vit fóru til verka, og tað eydnaðist.

Manbjørn Solmunde og Viberg Sørensen vóru teir, sum skóru ígjøgnum og byrjaðu at fiska havtasku við gørnum, seinni eisini svartkalva.

- Fyri umleið 10 árum síðan, tá ið at kalla øll fiskivinnan lá í andaleypi, og arbeiðsloysi á landi var stórt, var nógv frammi um alternativar veiðimøguleikar. Í dag er næstan tøgn um alternativar møguleikar.

Manbjørn heldur, at vit áttu at gjørt meira við ótraditionella veiði og leitað upp nýggjar leiðir í góðum tíðum, tá ið ráðini eru betur.

- Men líkt er ikki til, at nakað av týdningi verður gjørt, fyrr enn neyðin noyðir okkum at gera tað.

Skiparin heldur, at garnaveiðan eftir havtasku skuldi verið kvoterað, soleiðis at skipini kundu fiskað eitt ávíst tonsatal í part.

- Tað hevði kanska ført til, at menn fóru at royna nýggjar vinnur og nýggjar møguleikar, sigur Manbjørn Solmunde.



*- Fyri umleið 10 árum síðan, tá ið at kalla øll fiskivinnan lá í andaleypi, og arbeiðsloysi á landi var stórt, var nógv frammi um alternativar veiðimøguleikar. Í dag hoyrist lítið og einki, sigur Manbjørn Solmunde, skipari á Ólavi Hvíta.*

*Tað vóru Viberg Sørensen (mynd) og Manbjørn, sum byrjaðu at fiska havtasku við gørnum undir Føroyum*




Betri er at vera fyrivarin. Vit hava hollastu royndirnar í sjóvátrygging og kunnu veita tær ta bestu ráðgevingina. Saman við okkum ert tú stavnin frammanfyri.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo




Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri:

# – Eg eri ovurerrin av føroysku fiskivinnuni

**– Frá at hava havt eina fiskivinnu við politiskari smálutastýring og almennum stuðli, hava vit í dag eina vinnu, sum er betri rikin enn í grannalondunum. Fiskivinnan virkar frítt undir fastløgdum karmum, og vit hava eina vinnu, sum ber seg, og sum er før fyri at endurnýggja seg, sigur Jørgen Niclasen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*- Tað er umráðandi í einum fíggjarligum sumri at fáa hoyggið inn, áðrenn heystið kemur, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri*

Sunn vinna – sunt samfelag.

Hetta er eitt av slagorðunum hjá fiskimálaráðharranum, og sum gongdin hevur verið seinastu árini, er føroyska fiskivinnan vorðin ógvuliga sunn.

Tað er eisini staðfest, at okkara fiskivinna er betur rikin samanborið við hana í grannalondunum, og hóast hetta fyrst og fremst er dugnaligu føroysku vinnulívsmonnunum at takka, er einki at ivast í, at løgdu karmarnir hava havt ein týðandi leiklut í hesum.

– Føstu og tryggu karmarnir gera, at okkara vinnulívsmenn sleppa at "folda seg út". Vit hava avtikið planbúskapin, har politikarar sluppu at avgera alt niður í smálutir. Vit hava avtikið smálutastýringina, sigur Jørgen Niclasen.

Seinastu árini eru vit farin frá skipanini, har skip, virkir og sølulið vóru samantvinnað vertikialt. Vantandi kappingin gjørdi, at vinnan hevði eitt sera vánaligt úrslit. Men hendan samanbindingin varð slitin sundur.

– Uppboðssøla varð sett á stovn, so fría kappingin avgjørdi, hvør stóð seg, og hvør ikki megnaði at yvirliva. Sølufyritøkurnar sleppa ikki longur at selja fiskin, uttan at tær fáa besta prísin fyri vøruna. Virkir sleppa ikki at keypa, uttan at gjalda besta prísin fyri iskin. Skipini eru avmarkað og noyðast við góðsku sum vørumerki at selja har, ið mest fæst fyri fiskin, sigur Jørgen Niclasen.

### Endurnýggjan

Fiskimálaráðharrin vísir á, at hóast nøgdin á Føroyagrunnunum í meðal er 100.000 tons um árið, hevur útflutningsvirðið ongantíð verið nær námind tí, tað er í dag.

– Sjálvt um almenni stuðulin er burtur, eru úrslitini hjá vinnuni fyrimyndarlig, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at málið, sum hendan samgongan setti sær, var ein stuðulsfrí vinna, sum sjálv megnaði at endurnýggja seg.

– Stuðulin er burtur; fyritøkurnar geva yvirskot og endurnýggjan fer fram á øllum økjum, sigur fiskimálaráðharrin.

Største talið av nýggjum førum er í bólkinum útróðrarbátar. Í línuflotanum eru nýggjari skip. Lemmatrolararnir eru vorðnir nýggjari. Somuleiðis hjá partrolarunum, har nýggir eru í gerð. Hjá trolbátunum eru heilir 4 í sáttmála, ein nýggjur flakatrolari er komin, og hóast rækjuflotin er í svárari støðu í løtuni, er eisini endurnýggjan farin fram í tí skipabólkinum.

Hetta kemst alt av, at smálutastýringin er burtur, og vinnan sleppur at virka frítt undir fastløgdum karmum.

– Vinnan má tola at klára seg uttan almennan stuðul. Vit onnur mugu tola, at vinnan missir, men so sanniliga eisini vinnur pening, sigur Jørgen Niclasen.

### Varsemi

Vinnan klárar seg rættiliga væl, og orsøkirnar til hetta eru í høvuðsheitinum tríggjar.

– Umsetiligheitin er størri, kapping er um fiskin, og kanska mest umráðandi er, at partafelagsskatturin er lækkaður, sigur Jørgen Niclasen.

Hvat sigur so landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum um, at vinnan, hann umsitur, stendur seg so væl, sum hann heldur, at hon ger.

– Eg eri ovurerrin av úrslitunum. Fiskivinnan er - samanborið við aðrar vinnur - betur rikin. Og hóast vit ynskja endurnýggjan, er vinnan varin og leggur pening til síðis. Tað er umráðandi í einum fíggjarligum sumri at fáa hoyggið inn, áðrenn heystið kemur, sigur Jørgen Niclasen.

Men hóast tað stendur væl til í føroysku fiskivinnuni í løtuni, er umráðandi ikki at vera alt ov bjartskygdur kortini.

– Eg havi fyrr endurtikið aðrar, sum hava sagt, at trøini vaksa ikki inn í himmalin. Tað standi eg fast við. Framgongdin hevur verið øgilig seinnu árini, men nú eru tekin um, at hendan framgongdin ikki verður eins stór framyvir. Eingin vandi er á ferð, men vit mugu vera varin, tí vit mugu ikki rokna við, at vøksturin fer at halda fram ótarnaður, ávarar Jørgen Niclasen.

Við tí ovurstóra búskaparvøkstri, vit hava havt seinnu árini, hava bæði vinnan og landskassin konsoliderað seg.

– Gongdin er sunn og røtt, men nú fiskaprísirnir ikki eru uppgangandi longur, mugu vit ansa eftir ikki at loypa framav. Men, sum vinnan er rikin, eri eg bjartskygdur um framtíðina, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.


UNITED seafood

Framleiðarin av einum stórum úrvali av fiskaúrdráttum




Føroya Fiskavirking virkar fyri at framleiða og selja eitt stórt úrval av fiskaúrdráttum. Føroya Fiskavirking er størsti framleiðari av fiskavørum í Føroyum og keypa vit uml. 35% av øllum fiskinum, ið verður landaður í Føroyum frá føroyskum og útlendskum bátum.

Føroyar liggja mitt í kalda og reina Norðuratlantshavinum, og hetta hevur við sær, at møguleikin at fáa fríska og góða ráværu er í hásæti.

Føroya Fiskavirking
Vestara Bryggja
P.O. Box 3183
110 Tórshavn
Tel: 35 55 55
Tel: 35 55 50
www.united.fo

FØROYA FISKAVIRKING